


# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 5.– 10. september 2013

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*5-10 September 2013*

Eyðfinn Magnussen




NVD*Rit* 2013:12

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

| | |
|---|---|
| ***Heiti / Title*** | ***Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka*** <br> **5.- 10. september 2013** <br> *Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank* <br> *5-10th September 2013* |
| Høvundur / Author | **Eyðfinn Magnussen** |
| Ritslag / Report Type | Tøknifrágreiðing/Technical Report |

***NVD*Rit** 2013:12

© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

## Samandráttur

Magnus Heinason fekk einans 32 toskar í 29 hálum teir 5 dagarnar, hann gjørdi yvirlitstrolingar á Bankanum í september mánað 2013. Í vekt var samlaða veiðan av toski 347 kg. Hetta svarar til eina miðalveiðu, ið er 12 kg fyri hvønn fiskitíma, sum er ein minking uppá 51 % samanborið við veiðuna í fjør, tá samlaða veiðan av toski í heyst-yvirlitstrolingini var 703 kg. Støðan hjá toskinum á Bankanum er sostatt sera vánalig. Og hon bara versnar, og nú kunna toskarnir skjótt teljast á einari hond.

Tað er tó at fegnast um, at toskurin henda túrin var 10% feitari enn fyri einum ári síðani. Hetta sæst, tá hugt verður at konditiónsfaktorinum. Konditiónsfaktorurin er eitt lutfall ímillum vekt og longd á fiskinum, og sigur okkum, hvussu feitur fiskurin er. Hægri hetta talið er, feitari er fiskurin. Miðalkonditiónsfaktorurin hendan túrin var 1,17, sum er 9,7% hægri enn í fjør, tá konditiónsfaktorurin var 1,07.

Tað stendur ikki bara illa til við toskinum á Føroyabanka. Tað er eisini sera lítið til av hýsu og upsa. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var 36 kg pr. fiskitíma, móti 27 kg árið fyri. Hetta er ein vøkstur uppá 36%, samanborið við 2012. Samlaða veiðan av upsa var 78 kg, sum svarar til 3 kg fyri hvønn fiskitíma. Hetta er 82% minni enn upsaveiðan í 2012.

Hóast minking í upsaveiðuni, kunna vit tó fegnast um, at upsin var eitt vet feitari í ár enn fyri einum ári síðani. Miðalkonditiónsfaktorurin hjá upsa var 0.3% hægri hendan túrin. Hýsa var tó 1,2% klænri enn fyri einum ári síðani.

---------------------------------------------------------------------------------------------------------

**Fólk frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen og Jens Arne Thomassen.

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen, Fróðskaparsetur Føroya

**Endamál**: Hetta var tann triði og seinasti túrurin av heyst-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Vekt, tal og longdarbýti varð skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd á túrinum. Eisini vóru gjørdar magakanningar av toski, hýsu og upsa. Umframt at fiska, vóru mátingar eisini gjørdar av salti, hita og plankton á Bankanum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breitlarnir vóru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Seastar hitamátari, Sea-Bird CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 5. september kl. 21.00. Fyrsta CTD-støðin varð tikin 6. september kl. 05.46. Trolið varð koyrt út fyrstu ferð 6. september kl. 08.06. Seinasta støðin á túrinum var ein CTD-støð, sum varð tikin 10. september kl. 14.05. Vóru aftur á Havnini 10. september kl. 21.15. Allar støðir vórðu tiknar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu kannaðir umborð. Úrslitini frá Imponatorskipanini eru rættað og løgd í databasuna.

## Fyribilsúrslit

| Fiskaslag | Samlað veiða (kg) 2013 | 2012 | Munur (%) | Tal av prøvum Longdar-mátað | Stak-vektir | Nytrar | Magar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HAVMÚS | 2.935 | 2.120 | 38 | 245 | 209 | | |
| GULLLAKSUR | 1.655 | 1.379 | 20 | 234 | 177 | | |
| LOLIGO | 1.078 | 449 | 140 | 1416 | 462 | | |
| HÝSA | 1.032 | 773 | 34 | 822 | 577 | 374 | 88 |
| SVARTKJAFTUR | 918 | 808 | 14 | 421 | 208 | 10 | |
| KNURRHANI | 893 | 1.390 | -36 | 143 | 61 | | |
| GLÝSUFISKUR | 654 | 196 | 233 | 1019 | 369 | | |
| TOSKUR | 347 | 703 | -51 | 32 | 32 | 31 | 36 |
| LONGA | 284 | 128 | 123 | 71 | 71 | 70 | 11 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 174 | 153 | 13 | 101 | 99 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFSK. | 174 | 124 | 40 | 104 | 76 | | |
| SILVURMURTUR | 94 | 152 | -38 | 124 | 28 | | |
| HAVTASKA | 84 | 27 | 213 | 10 | 10 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 83 | 33 | 148 | 51 | 51 | | |
| UPSI | 78 | 439 | -82 | 33 | 33 | 33 | 15 |
| BROSMA | 46 | 26 | 79 | 19 | 19 | 19 | 2 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 30 | 58 | -49 | 30 | 30 | | |
| LÍTLA BROSMA | 23 | 9 | 169 | 16 | 15 | | |
| SKRUBBHÁVUR | 15 | 0 | - | 1 | 1 | | |
| SANDSPRØKA | 13 | 6 | 113 | 9 | 9 | | |
| SKØTA | 11 | 35 | -68 | 1 | 1 | | |
| TUNGA | 10 | 10 | 5 | 14 | 14 | | |
| NEBBASILD | 9 | 0 | 82964 | 138 | 66 | | |
| GLASKVOYSA | 8 | 49 | -84 | 3 | 3 | | |
| STREYMSILD | 7 | 0 | - | 8 | 5 | | |
| BUKSVARTI HÁVUR | 5 | 5 | -10 | 2 | 2 | | |
| LÝRUR | 5 | 0 | - | 1 | 1 | 1 | 1 |
| TRANTKONGAFISKUR | 3 | 5 | -43 | 2 | 2 | | |
| ROSSAMAKRELUR | 2 | 21 | -90 | 2 | 2 | | |
| LÁLLA | 2 | 0 | - | 1 | 1 | | |
| BLÁRIDDARI | 1.43 | 0 | - | | | | |
| REYÐI KNURRHANI | 0.79 | 4 | -80 | 1 | 1 | | |
| LAKSSILD | 0.02 | 0 | 143 | 1 | 1 | | |
| HVÍTINGUR | 0 | 0 | -100 | 1 | 1 | | |
| KALVI | 0 | 50 | -100 | | | | |
| MAKRELUR | 0 | 0 | -100 | | | | |
| BLÁLONGA | 0 | 1 | -100 | | | | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 0 | 1 | -100 | | | | |
| NEBBASKØTA | 0 | 6 | -100 | | | | |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0 | 0 | -100 | | | | |
| SILVURKALVI | 0 | 5 | -100 | | | | |
| HAVNEBBASILD | 0 | 0 | -100 | | | | |
| SVARTFISKUR | 0 | 1 | -100 | | | | |
| VØRPUSKEL | 0 | 0 | -100 | | | | |
| SKRAMBUL | 0 | 52 | -100 | | | | |
| SVARTBLETTUTA LANGASP. | 0 | 12 | -100 | | | | |
| **Tilsamans** | **10.676** | **9.232** | **16** | **5.076** | **2.637** | **538** | **153** |

***Talva 1:*** *Samlaða veiðan og tal av prøvum á Føroyabankatúrinum 5.-10. september 2013. Eisini verður samanborið við veiðuna heysttúrin árið fyri.*

**Fiskasløg:** Fingin vórðu íalt 33 ymisk fiskasløg á túrinum (*Talva 1*). Hetta eru eitt slag minni enn á heysti 2012, tá vit fingu 34 ymisk fiskasløg. Talið av fiskasløgum, sum verða fingin á yvirlitstrolingunum á Bankanum, er rættiliga støðugt; vanliga 33 ellal 34 ymisk sløg.

**Veiðan:** Samlaða veiðan hendan túrin var 10.676 kg. Hetta er 16 % meira enn fyri einum ári síðani, tá samlaða veiðan var 9.232 kg (*Talva 1*).

Á *myndunum 1 – 6* verður greitt frá veiðuni av toski, hýsu og upsa, og hvussu væl í holdum hesi fiskasløgini vóru.

**Toskur:** Samlaða veiðan av toski á Føroyabankatúrinum var einans 32 toskar, sum tilsamans vigaðu 347 kg.  Hetta er ein minking av veiðuni í vekt uppá 51% samanborið við í fjør, tá samlaða veiðan av toski var 703 kg. *Mynd 1* vísir miðalkonditiónsfaktorin á toskinum. Konditiónsfaktorurin sigur okkum, hvussu feitur fiskurin er. Miðalkonditiónsfaktorurin hendan túrin var 1,17, sum er 10% hægri enn í fjør, tá konditiónsfaktorurin var 1,07. *Mynd 2* vísir miðalveiðuna av toski í heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka árini 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 12 kg pr. fiskitíma. Hetta er 51% minni enn árið fyri, tá veiðan var 24 kg fyri hvønn fiskitíma. Samanborið við onnur ár, var veiðan tó sera lítil. Í 2002 var miðalveiðan 249 kg pr. fiskitíma.




***Mynd 1**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá toski á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1992-2013.*




***Mynd 2**: Miðalveiðan av toski (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2013.*

**Hýsa:** Í alt vórðu fingin 1.032 kg av hýsu. Hetta er ein vøkstur upp á 34% samanborið við árið fyri. Miðalkonditiónsfaktorurin fyri samlaðu hýsuna var 0,96, sum er 1,2 % lægri enn í fjør (*Mynd 3*). *Mynd 4* vísir miðalveiðuna av hýsu, fingin á heyst-yvirlitstrolingini síðani 1991. Her sæst, at veiðan øll árini til 2002 var støðugt vaksandi. Í 2002 var veiðan av hýsu 1.210 kg pr. fiskitíma. Men eftir hetta hevur veiðan verið støðugt minkandi. Í ár var tó ein lítil vøkstur, samanborið við 2012. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var einans 36 kg pr. fiskitíma, móti 27 kg í 2009. Hetta er ein vøkstur uppá 34%.




***Mynd 3****: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá hýsu  á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996-2013.*




***Mynd 4****: Miðalveiðan av hýsu (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991–2013.*

**Upsi:** Samlaða veiðan av upsa var einans 78 kg. Hetta er 82% minni enn upsaveiðan í fjør. Miðalkonditións- faktorurin á upsanum var 0,97, sum er 0,3% lægri enn fyri einum ári síðani. Á *mynd 6* er víst miðalveiðan av upsa á heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka frá árunum 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 3 kg pr. tóv, sum er 82% minni enn veiðan fyri einum ári síðani, tá veiðan var15 kg pr. tóv.




***Mynd 5****: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá upsa á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996 til 2013.*




***Mynd 6****: Miðalveiðan av upsa (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2013.*

Tórshavn 14. oktober 2013

Eyðfinn Magnussen______________________